# Silja Star leggur til brots fyrsta dagin

**- Fyrst kom Norrøna. Og nú kom so Silja Star, sigur ein vælnøgdur og ikki sørt errin, Palli Lamhauge um nýggjasta bát sín "Silja Star", sum nú er komin til landið!**



*Silja Star kemur við skúmandi ferð framvið sjóvarklettinum. Hetta vakra útsýnið fáa fólk nú møguleika at njóta umborð á bátinum, sum fyrsta dagin fer á sín fyrsta túr*
*Mynd: Árni C. Joensen*

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*

**Vestmanna:**
Í góðveðrinum sunnukvøldið vóru vestmenningar vitni til enn eina vakra sjón. Fyri ikki so langari tíð síðani kom ein ferðafólkabátur til bygdina. Og sunnukvøldið kom so enn ein slíkur stásiligur ferðafólkabátur til bygdina.

18 tímar frammanundan høvdu teir umborð lagt frá landi í Noregi, og kundu tí um 23-tíðina sunnukvøldið stima við fullari ferð inn á Vestmanna, har fólk tóku ímóti hesum nýggjasta bátinum í flota okkara.

Fyrrapartin í gjár komu umboð fyri Skipasýnið umborð fyri at geva Silju Star ta endaligu góðkenningina til flutningin av ferðafólkum. Og ein av fyrstu døgunum verður lagt til brots við ferðum kring alt landið.

- Vit hava longu fingið fleiri bíleggingar. So vit eru bara spentir eftir at leggja til brots, sigur Jákup Andreas Lamhauge í "Sea Service", og sum eigur nýggja bátin.

### Kring alt landið

Felagið eigur frammanundan bátarnar Silju og Fríðgerð, men hevur nú fingið sín triðja, og higartil største bát í flotan. Silja Star kann nevniliga taka 48 ferðafólk. Við hesum triðja bátinum hjá felagnum verða enn betri møguleikar hjá fólki at síggja vakra land okkara frá sjósíðuni.

Við hinum báðum bátunum hevur felagið í serligan mun gjørt túrar undir Vestmannabjørgini og onnur vøkur støð. Men við Silju Star verða møguleikar fyri ferðum kring alt landið.

Sum skilst kemur nýggi báturin tí eisini at sigla fyri ein part út frá Havnini.

Kostnaðurin fyri byggingina av Silju Star er um 8 mió. kr.

## FAKTA

**Navn:** Silja Star
**Stødd:** 4,65 m. breið og góðar 16 m til longdar
**Ferðafólk:** 48
**Bygd:** Måløy, Noregi
**Kostnaður:** 8 mió. kr.
**Eigari:** Sea Service í Vestmanna

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 22, 2005
www.kaupthing.fo

# Dollarin styrknar

MARKNAÐARRÁK

Í farnu viku styrknaði dollarin av álvara. Hann fór frá 1,26 til undir 1,23 dollarar fyri hvørja evru, og var til tíðir heilt niðri undir 1,22. Hann styrknaði umleið 2,5% í vikuni. At fransmenn og niðurlendingar søgdu nei til ES-stýrisskipanaruppskotið hjálpti ikki júst evruni. Men tað er áhugavert, at dollarin styrknaði í eini viku, har at kalla øll lyklatøl úr USA vóru vánaligari enn marknaðirnir væntaðu. Og talan var enntá um sera týðandi lyklatøl. Til dømis var arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri mai nógv verri enn væntað. Hetta bendir á, at íleggjarar á gjaldoyramarknaðinum eru vorðnir grundleggjandi meiri bjartskygdir um dollaran, og at hann tí kann styrkna enn meir komandi vikurnar.

### Lánsbrævarenturnar lækka enn

Rákið á lánsbrævamarknaðinum er ikki broytt síðan mars mánað, og renturnar halda áfram at lækka. Tað er nú langt síðani, gamla metið hjá donsku 10-ára rentuni á 3,52% varð tikið. Rentan er nú 3,21% og hon kann lækka meira.

### Partabrøvini toppaðu í farnu viku

Kursirnir á partabrøvum vóru í hæddini mikudagin, tá norrøna vísitalið var á sínum hægsta stigi í trý ár, men vendu av vánaligu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini. Vestas hækkaði knapt 6% í farnu viku orsakað av tíðindum um ein stóran ordra úr Ný Sælandi. Fleiri bíleggingar, nýggjur stjóri og sterki offshoreparturin hava givið íleggjarum stórar vónir til Vestas, og partabrævið er hækkað heili 50% síðan ársbyrjan. Eisini Statoil og SEB stóðu seg væl í farnu viku, meðan TDC og Tele2 stóðu seg illa. Hesa vikuna kunnu íleggjarar fara at staðfesta vinning av 6%-hækkingini seinastu 5 vikurnar.

### Hesa vikuna

Hendan vikan verður sera soltin, hvat lyklatølum viðvíkir. Úr Evropa kemur ídnaðarframleiðsla, og í USA fer Greenspan at røða um búskaparligu útlitini. Tí fer vikan á fíggjarmarknaðunum nokk at ganga við at sodna veiku arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina. Hetta kann ávirka bæði partabrøv og lánsbrøv.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 608,06 | 2,5% | ⬆ |
| JPY | 5,65 | 3,1% | ⬆ |
| GBP | 1.103,84 | 1,9% | ⬆ |
| NOK | 94,16 | 1,0% | ⬆ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,10 | 0,5% | ⬆ |
| Evru Lánsbrøv | 174,86 | 0,2% | ⬆ |
| Norrøn Partabrøv | 91,67 | 2,3% | ⬆ |
| Altjóða Vøkstur | 63,10 | 1,2% | ⬆ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*